# Nýggj skipan um barnavernd

**Nýggja skipanin skal tryggja rættartrygdina hjá familjum og børnum, nú fakfólk taka málini upp.**

BARNAVERND
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Endamálið við nýggju barnaverndarlógini, sum kom í gildi fyri knøppum ári síðan, er at tryggja børnum, sum liva undir umstøðum, ið kunnu skaða teirra heilsu og menning, neyðugu hjálpina og umsorganina í rættari tíð og at hjálpa teimum at fáa ein tryggan uppvøkstur.

Tað nýggja og slóðbrótandi við nýggju lógini er at finna í skipanini av barnaverndarøkjum runt í landinum. Sostatt áleggur lógin kommununum at finna saman í samstarvseindir á í minsta lagi 1.500 fólk, og í tilknýti til hesar eindir at seta eina fakliga umsiting, sum skal fyrireika og málsviðgera øll barnaverndarmál. Hesar eindir verða nevndar barnaverndartænastur, og verður skipanin vónandi ein fyrimunur fyri smáu samfeløgini, har ikki altíð er tespiligt at boða frá ella at skula viðgera barnaverndarmál. Tað er ógvuliga tilvitað, at orðið tænasta verður brúkt, tí vónin er, at fólk fara at kenna tað sum eina tænastu og ikki eina revsing, at hond verður tikin um børnini.

Í kjalarvørrinum á nýggju barnaverndarskipanini gjørdist eisini interkommunali stovnurin Barnaverndarstovan veruleiki. Skrivstovan lat upp 1. desember 2005 og er mannað av trimum starvsfólkum, sum eru Anna Dam, leiðari, Hallbjørg Lamhauge, leiðari av Fosturforeldraskipanini og Jendis Gærdbo, sum er skrivari. Sambært heimasíðuni hjá stovuni, eru uppgávurnar hjá henni:

- At umsita fosturforeldraskipanina
- At veita barnaverndartænastum og samdøgurstovnum holla vegleiðing og ráðgeving
- At virka sum ráðgevi hjá landsstýrinum á barnaverndarøkinum
- At styrkja og samskipa barnaverndarøkið
- At fáa til vega hagtøl og skipa fyri gransking og menning á økinum.

Vónin við nýggju skipanini er, at umsitingin av barnaverndarmálum verður smidligari, skjótari og meira professionel, samstundis sum at ætlanin er at skipa fyri skeiðum og kunnandi tiltøkum fyri fakfólki, eitt nú um fráboðanarskylduna og um at lesa av tekin um vanrøkt, ágang og umsorganarsvík. Harumframt er eisini ætlanin at seta niður lokalar tvørfakligar bólkar við umboðum úr skúlunum, dagstovnum, heilsuverki og almannaverki.




# Eftirlýsa fosturfamiljur

**Úrvalið av fosturfamiljum skal vera større og meiri fjølbroytt, so lættari verður at finna røttu familjuna til rætta barnið. Hetta er ynski frá Barnaverndarstova Føroya.**

BARNAVERND
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Av Føroya Barnaverndarstovu verður sagt, at tørvurin á fosturfamiljum er ovurhonds stórur, serliga í høvuðsstaðarøkinum. Talan er bæði um vanligar fosturfamiljur og familjur, sum kunnu taka børn til umlættingar.

Sjálvsagt verða ávís krøv sett fosturfamiljum. Í fyrsta lagi skal fosturfamiljan draga umsorgan fyri barninum, sum var tað teirra egna. Samstundis skulu tey duga at seta seg inn í støðuna hjá barninum og skilja, at barnið hevur eina søgu og nakrar upplivingar, sum merkja tað. Fosturfamiljan skal verða til reiðar at lata barnið frá sær aftur, um tað skal heim aftur og hon skal kunna samstarva við biologisku familjuna hjá barninum. Um barnið skal búgva fast í heiminum, skal tað helst hava eitt kamar, men annars eru tað ikki fysiska umhvørvið hugt verður mest eftir, verður sagt av Barnaverndarstovuni.

Í ávísum førum er tað ein fyrimunur, um fosturforeldrini hava eina ávísa útbúgving, so sum pedagogur ella lærari. Hesir starvsbólkar hava lært at verða serliga tilvitaðir um børn, sum hava ein serligan tørv, og nøkur av børnunum bera ymisk brek, sálarlig, kenslulig ella kropslig.

Sambært Barnaverndarstovuni er serstakliga tørvur á familjum, sum kunnu taka ungar teenagarar til sín. Hetta kemst helst av, at tað er nústani tá, at møgulig tekin og sár veruliga koma til sjóndar, og tá hava aðrar loysnir kanska longu verið royndar, til men til fánýtis.

### Breiðari úrval

Av Barnaverndarstovuni verður sagt, at trupulleikin er ikki so stórur, at tey mangla familjur, tá eitt barn hevur tørv á tí. Men tey hava eitt stórt ynski um fleiri familjur, so úrvalið verður fjølbroyttari og at tað sostatt verður lættari at matcha familju og barn. Her verður eitt nú hugsa um førleikar og bústað hjá familjuni.

Tað er næstan altíð ein fyrimunur, um barnið framhaldandi kann vera í vanda umhvørvinum, so sum skúla/stovni og grannalagi. Í lógini er verður sagt, at myndugleikarnir fyrst skulu royna at finna fosturforeldur millum kenningar ella familjuna hjá barninum. Til dømis kann talan vera um eina ommu, lærara, pedagog ella granna, sum barnið hevur álit á.

Samsýningin fyri at vera fosturfamilja veldst um, hvussu kravmikil uppgávan verður mett at vera, og verða upphæddirnar ásettar í kunngerð frá Almanna- og heilsumálaráðnum. Ofta eigur barnið onki, tá tað verður sett heiman, og tí fær fosturfamiljan hjálp til at etablera barnið, so sum song og seingjarklæði. Harumframt fær fosturfamiljan kostískoyti, lummapening, klæði og samsýning annars. Vanliga kunnu fosturforeldrini halda fram á arbeiðsmarknaðinum, og barnið gongur í barnagarði ella skúla, men summi mál eru somikið krevjandi, at mett verður, at barnið skal vera heima. Tá verður samsýningin mett út frá vanligari mánaðarløn.

## Tekin um umsorganarsvík og ágang

**Á heimasíðuni hjá Barnaverndarstovu Føroya er stutt leiðbeining til fólk, sum starvast við børnum og til onnur, ið varnast, at børn ikki hava tað gott.**

Hvat hendir tá tú ringir til barnaverndartænastuna

Á barnaverndartænastuni ber til at koma í samband við ein sosialráðgeva. Tú kanst fáa ráðgeving, uttan at upplýsa hvat barn talan er um. Eingin fyriskipan verður sett í verk, einans av tí orsøk, at tú hevur tørv á at tosa við onkran um tað, tú hevur varnast.

Tað vil siga, at tínir spurningar ella upplýsingar nýtast ikki at seta nakra fyriskipan í verk. Tað er heldur ikki neyðugt at upplýsa familjuni, at tú hevur ringt til barnaverndartænastuna. Hetta kann bíða til avtala er gjørd við sosialráðgevaran um, hvat skal henda í málinum víðari.

**Soleiðis kanst tú gera, varnast tú okkurt, ið ikki ruggar rætt**

- Tosa við starvsfelagar/ leiðslu um tað er innan starvsøkið títt
- Set teg í samband við barnaverndartænastuna og fá dulnevnda ráðgeving
- Tosa við foreldrini hjá barninum um tað, tú hevur illgruna um
- Stúrir tú enn fyri støðuni hjá barninum kanst tú:
- Antin siga við foreldrini, at tú stúrir fyri barninum og, at tú hevur í hyggju, at taka tað upp við barnaverndartænastuna
- Tosað við barnaverndartænastuna
- Gera eina skrivliga frágreiðing til barnaverndartænastuna, sum inniheldur:
- Navn og bústað hjá barninum og hjá foreldrunum
- Hvussu leingi tú hevur kent barnið og familjuna
- Lýsing av tí, sum tú hevur varnast
- Hvat tú hevur sagt við foreldrini og hvat hava tey sagt/gjørt í tí sambandi
- Hevur tú ikki tikið trupulleikan upp við foreldrini, frágreiðing um hví
- Tína meting um, hvørji fyrilit skulu takast um so er, at ein fyriskipan skal setast í verk
- Tann sum fráboðar verður vanliga ikki kunnaður um, hvat víðari hendir í málinum!!

**Tekin um umsorganarsvík og ágang**

KROPSLIGUR HARÐSKAPUR

- Blá merki, rípur eftir eitt nú sløgum við reim ella stavi,sjónligir reyðir prikkar frá sløgum við hárbust
- Brunasár og bløðrur – kunnu stava frá sigarettum,tendrara o.ø.
- Blá merki um hálsin ella merki frá bandi kunnu vera tekn um roynd at kvala
- Harðlig atferð móti øðrum børnum

SÁLARLIGUR HARÐSKAPUR

- Atburður,ið víkir frá
- Málsligu førleikar eru vánaligir